

## Mótmæla hægri avgjaldi

Í Íslandi er serðavinnan harðliga ímóiti einari ætlan hjá stjórnini at hækka meirvirðisgjaldið fyri máltíðir og gistingar á matstovum og gistingarhúsum. Vinnan sigur, at útlendsk ferðafólk eru yvirhøvur samd um, at príslegan í íslendsku ferðavinnuni er rímilig, men at ætlanin hjá stjórnini fer at gera enda á hesari jaligu uppfatanini. Steingrímur J. Sigfússon, fíggjarmálaráðharri, segði í gjár, eftir ætlanini skulu ríkiskassin og ferðavinnan býta inntøkurnar av einum møguligum hægri meirvirðisgjaldi sínamillum.

## Albania nærri ES

Uttanríkisráðharrarnir í ES-londunum hava samtykt, at Albania kann søkja um limaskap í samveldinum. Samráðingarnar kunnu tó ikki byrja, fyrr enn ES-nevndin eisini hevur góðkent albansku umsóknina, og tí kunnu ganga fleiri ár, áðrenn limaskapurin verður veruleiki, sigur DR. Kommiserurin Olli Rehn, sum hevur ábyrgdina av tingingum við umsøkjaralond, sigur, at Albania lýklur fleiri av treytunum fyri limaskapi, men at landið skal fremja munandi politiskar og búskaparligar nýskipanir, áðrenn tað kann koma upp í ES.

# Samgongan tolir ikki sterkt øl

**Johan dahl hevur slept ætlanini at gera tað lógligt at bryggja sterkt øl í Føroyum, tí tað kundi sett samgonguna í vanda**

STERKT ØL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg fari ikki at seta samgonguna í vanda fyri sterkt øl!

Tað staðfestir Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum.

Fyri einum ári síðani kunngjørdi hann, at hann ætlaði at leggja uppskot fyri Løgtingið um at gera tað lógligt at bryggja øl í Føroyum, sum er sterkari enn 5,8%.

Men Føroyingar eru eftir øllum at døma ikki nóg vaksnir til at teir tola at síggja eina sterka ølfløsku fyri eygunum.

Tí nú sigur landsstýrismaðurin, at hann hevur slept ætlanini.

Og orsøkin til tað er, at hann hevur fingið at vita, at tað er ikki meiriluti fyri tí í samgonguni.

- Eg havi kannað málið og eg havi staðfest, at tað er ikki meiriluti í samgongini fyri einum uppskotið um at gera tað lógligt at bryggja sterkt øl í Føroyum, staðfestir Johan Dahl.

### Ølið skuldi í tingið

Upprunaliga var tað Bjørt Samuelsen úr Tjóðveldinum, sum legði uppskot fyri Løgtingið um at taka allar avmarkingar av og at loyva føroyingum at bryggja og drekka øl, sum er sterkari enn 5,8% og at gera tað lógligt at bryggja brennivín her á klettunum eisini.

Tað fekk ikki undirtøku, men tá kunngjørdi Johan Dahl, at hann fór at leggja uppskot fyri Løgtingið um at gera tað lógligt at bryggja og drekka øl í føroyum, sum var sterkari enn 5,8%.

Fyri at gera tað lættari at glíða niður hjá løgtingslimunum, vildi hann ikki taka tað við, at at tað skuldi vera lógligt at bryggja brennivín eisini.

### Kundi sprongt samgonguna

Men enn er onki uppskot um hetta komið frá landsstýrismanninum.

Og nú er greitt, at tað kemur heldur onki uppskot um hetta.



*Enn er føroyingar ikki nóg vaksnir til at drekka sterkt øl og tí hevur Johan Dahl slept ætlanini um at gera tað lógligt at bryggja sterkt øl í Føroyum*

Eg veit úr samgonguni, at eg havi ikki politiska undirtøku fyri tí, sigur Johan Dahl fyri Sosialinum.

Hann sigur eisini, at tað kann heldur ikki koma upp á tal at leggja uppskotið fram, fyrrenn hann fær vissu fyri, at undirtøka er fyri tí, so at tað verður samtykt.

Men vit hava sæð fyrr, at uppskot verða løgd fyri løgtingið, sum bæði einstakir limir í samgonguni og í andstøðuni hava atkvøtt fyri, so at tað verður samtykt. Hví ikki royna tað í hesum málinum eisini?

- Eg fari ikki at seta samgonguna í vanda fyri eitt uppskot um sterkt øl, sigur Johan Dahl.

Samstundis staðfestir hann, at málið er so viðbrekið í samgonguni, at hevði hann lagt uppskotið fram, kundir tað sprongt samgonguna.

- Tað er ikki undirtøka í samgonguni fyri málinum og sjálvandi eri eg trúgvur mótvegis samgonguni og tí verður málið ikki lagt fram, so einfalt er tað, sigur Johan Dahl.

# Orkuráðið farið til verka

**Nevndin í orkufelagnum, sum varð stovnað í Hvalba leygardagin, er longu farin til verka**

ORKUFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nevndin í nývalda orkufelagnum fyri bygdirnar Hvalba og Sandvík, er longu farin til verka.

Felagið varð stovnað leygardagin og í gjárkvøldið hevði nevndin sín fyrsta fund, har hon skipaði seg.

Formaður í felagnum er Poul Laust Christiansen, næstformaður er John Berg og skrivari er Rúni Thomsen. Hinir báðir nevndarlimirnir eru Katrin Joensen og Ingibjørg Vestergaard. Tiltakslimir eru Trúgvi Thomsen og Jón Næs.



*Her eru fimm av sjey nevndarlimum í nývalda orkuráðnum í Hvalbiar Kommunu. Aftast vinstrumegin stendur Poul Laust Christiansen, nevndarformaður og Rúni Thomsen, skrivari. Tey sum sita, eru frá vinstru, John Berg, næstformaður, Ingibjørg Vestergaard og Katrin Joensen. Teir báðir síðstu nevndarlimirnir, Jón Næs og Trygvi Thomsen eru ikki við, tí teir eru burturstaddir*

### Bílig og varandi orka

Endamálið við felagnum er at veita húsarhaldunum í Hvalba og í Sandvík bíliga og burðarygga orku.

Til tað endamálið er ætlanin at seta eina felags vindmyllu upp á fjallinum ímillum Hvaba og Sandvík, sum skal veita húsunum orku til at hita húsini við.

Fyrsta stigið hjá nevndini verður at senda eina umsókn til Hvalbiar Kommunu um stuðul til at gera tær neyðugu vindmátingarnar, sum skulu til fyri at vita, hvar myllan skal setast.

Tað er ikki lætt at siga, hvussu nógv slíkar vindmátingar kosta, men leyðsliga meta vit, at tær kosta einar 200.000 krónur, sigur Poul Laust Christiansen, nevndarformaður.

### Kommunalur stuðul avgerandi

Tað er eisini hendan upphæddin, sum felagið fer at søkja kommununa um í stuðuli.

- Vit halda, at tað er avgerandi neyðugt, at kommunan vísir ætlanini ans og stuðul, tí er kommunan við,verður tað lættari at fáa aðrar stuðlar eisini, so at verkætlanin kann gerast veruleiki.

Nevndin í orkufelagnum ivast heldur ikki í, at kommunan er áhugað at stuðla ætlanini, tí 200.000 krónur er minni enn kommunan brúkar hvørt einasta ár til at hita kommununalar bygningar við. So eydnast hendan verkætlanin, hevur kommunan beinanvegin spart tað inn aftur, sigur nevdarformaðurin.

Kommunustýrisfundur verður 26. november og tá fer kommunan væntandi at taka støðu til málið.